Terje Hagevang, jarðfrøðingur:

# Risastórar gasskeldur undir basaltinum

**Olju- og gassfund á djúpum vatni í norskum øki kunnu vera tekin um, at eitt nú stórar nøgdir av gassi goyma seg undir føroyska basaltinum. 2. útbjóðing á landgrunninum, sum nú verður veruleiki fer helst at fevna um umráði, sum oljufeløg longu hava útpeikað sum týðandi gassøki.**

OLJUFRAMTÍÐ
*Jan Müller*

Júst í hesi løtu sita serfrøðingarnir hjá Shell í Aberdeen og viðgera seinastu upplýsingarnar frá seinastu boringini norðaliga á bretska landgrunninum í Ben Nevis strukturinum. Boringin byrjaði 6. august og hava oljufeløgini, sum eru við í boringini, Shell, BP og Statoil alla tíðina vitað, at talan er um sera váðiliga boring tvs. "high risk". Men talan er um eitt boriforpliktilsi. Brunnurin verður boraður um sama mundið, sum Statoil hevur gjørt eitt heldur óvæntað olju- og gassfund, Ellida á djúpum vatni í norskum øki.

Terje Hagevang, jarðfrøðingur og stjóri í nýggja oljufelagnum Geysir, sigur við Sosialin, at bæði Ellida og Ben Nevis eru áhugaverd fyri føroyingar eisini, tí talan er um somu jarðløg, ið finnast her. Í hvussu er ein stórur strukturur, lýkur Ellida, Ormen Lange og Ben Nevis, finst norðaliga á føroyska landgrunninum skamt frá markinum.

Terje Hagevang, sum skal halda fyrilestur í Oljutinginum í kvøld, sigur soleiðis um áhugaverdu gassframtíðina á djúpu økjunum á Atlantsmótinum og í norskum øki:

- Ellidafeltet (sí guli bletturin á kortinum út fyri Noreg) viser seg nå å inneholde olje og gass, men at kvaliteten på sandsteinene ikke er den beste slik at det knytter seg usikkerhet til strømningsrater og derved kommersialitet. Imidlertid er funnet svært positivt, og viser at det er mer olje I dypvannområdene utenfor Norge enn den tynne sonen som finnes i Ormen Lange (eitt risastórt gassfund nærhendis Ellida, sum varð gjørt fyri stuttum), hvor gassen er besluttet utbygd. I Ormen Lange er også kvaliteten av sandsteinene god, og det gjenstår da bare å finne mer god sand. Her er nok gamle svakhetssoner i berggrunnen styrende for sedimentasjonen, slik det er demonstrert vest for Shetland, og man også aner er tilfellet på færøysk sokkel.




*Kortið vísir okkum Ellida og Ormen Lange fundini á norskum øki, Ben Nevis brunnin á bretskum øki og stóra strukturin á føroyskum øki, sum verður mettur at verða eitt risastórt gassfelt. Kelda Sagex Petroleum.*

Ben Nevis er tildels av samme prospekttype som Ellida, og det blir umåtelig spennende å følge denne boringen. På færøysk sokkel finnes flere slike prospekter (eitt er teknað við gulum á kortinum). Så det burde fortsatt være en framtid for færøysk sokkel som olje- og gassprovins.

Terje Hagevang sigur, at teir, ið manna Sagex Petroleum, trúgva uppá henda møguleikan,. Og tí hava teir eisini stovnað eitt nýtt oljufelag, Geysir, sum fer at leggja seg eftir at leita eftir olju og gassi á øllum Atlantsmótinum. Felagið hevur longu savnað inn nógvan seismikk í økinum og ætlar sær eisini at vera við í eini komandi 2. útbjóðing á landgrunninum.

Sagexfólkini vóru upprunaliga partur av Saga Petroleum, sum var eitt av undangongufeløgunum á landgrunninum undan fyrstu útbjóðing og varð yvirtikið av Norsk Hydro, sum tá søkti nettupp uppá økini norðan fyri, ið uttan iva verða partur av 2. útbjóðing.

- Eg gleði meg at koma aftur til Føroya sigur Terje Hagevang undan fyrilestrinum á Oljutinginum á Hotel Føroyum í kvøld. Trý ár eru farin síðani hann var her seinast, og tað er alt ov langt síðani sigur hann. Terje Hagevang kom fyrstu ferð til Føroya í 1996, tá hann var stjóri í Saga.

Í fyrilestri sínum á Oljutinginum fer Terje Hagevang at tosa um ta virksemi, sum hevur verið á Atlantsmótinum, hvat hann heldur um útlitini fyri Atlantsmótið, sum Føroyaøkið so er ein týðandi partur av.



*Terje Hagevang, ein av jarðfrøðiligu veteranunum á føroyaøkinum skal halda fyrilestur í Oljutinum í kvøld um framtíðar útlitini á Atlantsmótinum. Her er hann saman við Eyðun Elttør, á oljumessuni í Aberdeen*

*Mynd Jan Müller*

### Seinasta nýggja um Ben Nevis

Sosialurin hevur skilt frá oljukeldum í Aberdeen, at Ben Nevis brunnurin varð sum væntað – sera váðiligur, og at tað helst ikki er gjørt nakað fund í hesum førinum. Tað er boripallurin Jack Bates, sum hevur staðið fyri boringini og hevur eisini verið borað niður gjøgnum nakrar hundrað metrar av basalti eisini, nakað, sum oljufeløg, sum leita við Føroyar, og føroyskir myndugleikar, uttan iva vilja hava meira at vita um, tá hetta uttan iva verður ein av stóru avbjóðingum í framtíðar leiting á landgrunninum.

# Helst stórt oljufund við markið

OLJUFUND
*Jan Müller*
*Jan@sosialurin.fo*

Cambobrunnurin, sum varð boraður í fjør av Amerada Hess, Dong, ChevronTexaco og OMV er eftir øllum at døma eitt veruligt oljufund. Hetta upplýsa keldur fyri Sosialinum. So stórar eru vónirnar til henda brunnin, at feløgini í løtuni umrøða spurningin um at bora ein avmarkingarbrunn longu næsta summar. Helst verður tað til tað, nú upplýsingarnar, ið brunnurin higartil hevur givið, síggja rættiliga positivar út. Gevur avmarkingarbrunnurin eitt gott úrslit, hvat roknað verður við, so kann talan verða um at fara undir at byggja feltið út longu frá næsta ári. Cambobrunnurin hevur stóran týdning fyri komandi leiting á Føroyaøkinum. (sí kort á síðu 17) Hann liggur skamt frá markinum og nærhendis 9 ára loyvinum hjá ENI og Føroya Kolvetni. Hann liggur eisini tætt upp at økjum, sum væntandi verða við í ein i 2. útbjóðing á landgrunninum.



# Bjóða oljufeløgum nýggj øki á landgrunninum

**- Oljumálaráðið metir, at loyvihavararnir arbeiða rættiliga miðvíst við føroyaøkinum í løtuni og hava kanska vundið seg í gongd aftur aftaná vónbrotið í 2001 sigur Herálvur Joensen, aðalstjóri í Oljumálaráðnum, nú tey eru farin at fyrireika eina nýggja útbjóðing**

NÝTT ÚTBJÓÐINGARUMFAR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Í gjár fóru nøkur týdningarmikil brøv frá Jarðfrøðissavninum á posthúsið. Brøv sum kunnu koma at geva okkum svarið uppá, um olja og gass er í undirgrundini. Tað snýr seg um næsta útbjóðingarumfar á føroyskum øki. Tað eru sjey síðani, at myndugleikarnir fyrstu ferð heittu á altjóða oljufeløg um at nominera tvs. at peika út, hvørji øki tey kundu hugsað sær at bjóða uppá á føroyska landgrunninum.

Herálvur Joensen, aðalstjóri sigur við Sosialin, at tað sjálvandi er vónin, at so nógv feløg sum gjørligt fara at svara og ikki minst svara positivt. Nomineringin er ein liður í at taka avgerð um, antin vit skulu hava eina útbjóðing nú ella ikki.

Uppá fyrispurning um ikki vandi er fyri, at undirtøkan verður lítil, nú einki lønandi fund enn er gjørt, at vit kunnu missa runduna á gólvið, hvat ein hevur dømi um aðrastaðni eitt nú Grønlandi, sigur Herálvur Joensen, at tað vónar hann sjálvandi ikki verður støðan. Og trýr tað heldur ikki. Hann sigur, at tey longu vita, at tað er ein ávísur áhugi millum feløg, sum tað hevur eydnast teimum at tosa við. Spurningurin er so, hvat slag av skyldum "commitment" kemur burtur úr tí.

Við hesum fyri eygað hava tey eisini gjørt eina tíðarætlan fyri víðari gongdini. Jarðfrøðissavnið heitir í brævinum á oljufeløg um at nominera øki á føroyska landgrunninum. Freistin fyri at svara er 15. desember. Síðani verður avgerð tikin um nýggjársleitið, um vit skulu gjøgnumføra eina rundu í 2004. Er neyðugi áhugin til staðar verður ein útbjóðingarlóg gjørd í januar og koyrd gjøgnum tingið næsta vár við tí ætlan at fáa latið 2. útbjóðingarumfar upp seint komandi vár ella tíðliga komandi summar. Umsóknarfreist verður so til út á heystið 2004, soleiðis at loyvini kunnu lutast út á vetri 2004 ella tíðliga í 2005.

Uppá fyrispurning um tað ikki er eitt sindur av "gambling" at lata eina rundu upp, nú vónbrotini eru mong og einki lønandi fund er gjørt í 1. rundu sigur Herálvur Joensen, at tað er altíð eitt sindur av gambling. Men teirra varhugi er, at tað er ein ávísur áhugi fyri økjunum uppat verandi 9 ára loyvum og norðureftir. Men vísir tað, at áhugin ikki er nóg stórur, so verður helst bíðað við eini nýggjari rundu til tíðin er meira hóskandi.

Sosialurin skilur annars, at summi feløg eru sinnað at bjóða, meðan onnur eru meira hugað fyri at fara uppí onkran bólk. Uppaftur onnur hava ikki hetta økið við í teirra arbeiðsskráum. Tvs. Atlantsmótið sum heild er ikki partur av teirra strategi. Møgulig boriforpliktilsi í 2. rundu verða so ikki veruleiki fyrr enn í 2006.

Annars er annars aðalstjórin í Oljumálaráðnum als ikki so svartskygdur, sum kanska mongu eru tað í dag. –Oljumálaráðið metir, at loyvihavararnir arbeiða rættiliga miðvíst við føroyaøkinum í løtuni og hava kanska vundið seg í gongd aftur aftaná vónbrotið í 2001. Vit hava í tí samanhanginum heldur ikki varhugan av, at turri brunnurin hjá ENI hevur verið nakað afturstig fyri økið í hesum sambandi.

Hann vísir á, at sjálvandi er tað stórt spell við einum turrum brunni, men eingin ella fáur hevði tær heilt stóru vónirnar til henda brunnin.



*Kortið sínir útviklingin á Atlantsmótinum. Vit síggja (pílurin) áhugaverda Cambobrunnin 204/9 & 10 norðan fyri og beint eystan fyri markið, sum helst er eitt lønandi fund*



*Longu fyri umleið 10 árum síðani, tá fyrsta seismikkskipið, nakrantíð legði at í Føroyum, Patrick Haggarty, vísti ein av geofysikarunum umborð á økini norðari á landgrunninum sum tey mest áhugaverdu. Nú kemur ein nýggj útbjóðing so helst at fevna um nettupp hesi økini*

*Mynd Jan Müller*

NÝTT
Netbóking
Nú kanst tú keypa tína ferð á atlantic.fo
Nú er lætt at keypa ferðaseðlar frá Atlantic Airways. Vit hava nevniliga fingið netbóking á heimasíðuni. Far inn á atlantic.fo og bílegg tín ferðaseðil. Tað einasta, tær nýtist, er eitt gjaldkort.
Gjaldkort, sum kunnu nýtast: Dankort/VISA, VISA, MasterCard, Diners Club
ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Faks 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo
SANSIR 355 355